# Politisk profilering ikki áv

**- Størsta avbjóðingin, sum føroyska samfelagið stendur fyri beint nú, er at fáa selt nakrar av almennu ognunum fyri marknaðarvirði, gjalda skuldina niður og fáa javnvág á fíggjarlógini, soleiðis at vit fáa ein sjálvberandi búskap, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

EINSKILJINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú einskiljingar nærmast er vorðið gandaorð í politiska kjakinum, hevur Sosialurin vent sær til umboðið fyri minsta flokk á tingi, Sjálvstýrisflokkin. Vit hava skift orð við Kári P. Højgaard, formann floksins, um einskiljingarætlanir landsstýrisins, og um hvørjar av ætlaðu einskilingunum, hann heldur eiga at fremjast – og fremjast fyrst.

Kári heldur, at landsstýrið í fyrsta lagi eigur at einskilja Føroya Banka og Føroya Tele, tí hetta eru fyritøkur, sum í dag kappast undir marknaðartreytum og eru léttar at selja.

- Føroya Banki og Føroya Tele eru heldur ikki kensluliga so viðbreknar og hava ikki eins stór árin á vanliga gerandisdagin hjá vanliga føroyinginum, sum eitt nú Faroe Seafood og Atlantic Airways hava.



*- Tað er vandatekin, at gjógvin millum tey lægru løntu og hægri løntu veksur, heldur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Partabrøv fyri serprís

Kári vísir á, at tað enn stendur frískt í minninum hjá partaeigarunum í Føroya Banka, tá ið partabrøvini á sinni vórðu niðurskrivað til nærum einki, hóast fyritøkan seinni vísti seg at vera eitt gullegg.

- Tað er ein spurningur, um rætt varð farið fram móti teimum smærru partaeigarunum í bankanum við niðurskrivingini av partabrøvunum til lítið og einki.

Løgtingsmaðurin heldur, at allir føroyingar eiga at fáa møguleikan at ogna sær eini tvey partabrøv í Føroya Banka á 1000 krónur til serprís, eitt nú kurs 110 sum endurgjald fyri niðurskrivingina.

- Landsstýrið eigur eisini at fráboða alment, at ætlanin er at selja meirilutan av partabrøvunum í bankanum á Virðisbrævamarknaði Føroya.

Kári P. Højgaard heldur, at tað hevði verið ein styrki fyri bankan, at hann hevði ein breiðan eigaraskara, hóast hugsandi er, at ein stórur íleggjari keypir meirilutan.



## Eigarakensla

- Tað gevur eina serliga eigarakenslu, tá ið tú eigur partabrøv í eini fyritøku, og somuleiðis kann tað vera ein dreymur einaferð at kunna selja hesi við vinningi, tá ið pensjónsárini eru komin. Hetta kundi verið eitt íkast til pensjónina ella dreymaferðina til sólfyltar strendur.

Tí heldur løgtingsmaðurin, at møguleikin skal verða hjá vanliga føroyinginum at eiga ella keypa fleiri partabrøv, tá ið Føroya Banki verður seldur.

Kári vísir á, at bankin er yvirkapitaliseraður í mun til bankar aðrastaðni og í mun til kappingarneytarnar í Føroyum.

Hann heldur, at ein møguleiki fyri avkapitalisering er, at bankin keypir Húsalánsgrunnin ella Realin og at peningurin, sum fæst á henda hátt, verður brúktur til niðurgjalding av almennu skuldini.

## Verulig virðir fyri ognirnar

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins heldur tað vera burtur við, at almennu Føroyar eiga meira enn 60% av øllum partapeningi í Føroyum.

- Her eigur ein partur avgjørt at verða seldur privata vinnulívinum.

Kári leggur tó dent á,

# Skip selja bæði fyri og eftir jól

**Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya sigur, at trýstið á marknaðinum hevur ikki verið so ógvuliga stórt nú uppundir jólahøgtíðina**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Uppboðssølan hjá Fiskamarknaði Føroya selir fram til og við, 23. desember, og longu 3. jóladag, 27. desember, letur marknaðurin uppaftur.

Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya sigur, at trýstið á marknaðinum hevur ikki verið so ógvuliga stórt nú uppundir jólahøgtíðina.

- Nøkur skip eru úti enn og fara á marknaðin fyri jólahøgtíðina. Onnur skip koma inn beint fyri jól og fara á marknaðin, tá ið selt verður aftur, 27. desember.

Hann heldur, at upsaprísurin hevur verið heldur lægri í seinastuni, nú so nógvur fiskur hevur verið at fingið, men fallið hevur ikki verið tað stóra.

Høgni veit at siga, at umframt partrolararnir, sum meira at kalla burtur av veiða upsa, hava lemmatrolarar eisini fiskað upsa, og hetta kemst av, at prísirnir hava verið hampiliga góðir.

- Fiskurin er betri, og tað eru prísirnir eisini. Prísmunurin er stórur frá tí, teir vóru lægstir fyrr í hesum árinum, sigur Høgni Hansen.



*Fleiri skip lógu við Kósabrúnna mánamorgunin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*